# ítróttur

Nr. 144 • týsdagur • 3. august 2004 • 78. árgangur • www.sosialurin.fo

# Súni syrgdi fyri GÍ sigri

**Umskipaðu fuglfirðingarnir mistu javnleikin stutt undan leikloki, tá ið teir hugdu at linjuverjanum og lótu vandamiklasta gøtumannin skjóta mál**

ÍF–GÍ
*Jóannes Hansen*



*Við tveimum málum syrgdi landsliðsleikarin hjá GÍ, Súni Olsen, fyri, at gøtumenn fóru úr Fuglafirði aftur við øllum trimum stigunum.*

Hvussu langt er tað síðani, at ÍF hevur vunnið á GÍ. Spurningurin var relevantur í hálvleikssteðginum í dýrdarveðrinum í Fuglafirði sunnudagin, har tað væl sást, at talan var um fyrsta týdningarmikla dystin eftir meiri enn mánaða langan feriusteðg.

Svarið er, at tað framvegis er langt síðani – rættuliga langt síðani, at ÍF seinast fekk fult ímóti gøtumonnum.

Hesa ferð helt ÍF leiðlsan frá fimm minuttum undan steðginum og til eitt korter eftir steðgin. Magni á Lakjuni, sum var tann fuglfirðingurin, ið dugdi best við bóltinum, fekk heimamenninar í heilt gott lag, tá ið hann við fínum frísparki úr 23 metrum lyfti upp um manngarðin og umvegis stólpan legði bóltin í netið aftanfyri Hall Hansen.

Beinanvegin í 2. hálvleiki var um reppið, at ÍF økti um leiðsluna. Eftir fínt álop í vinstru, legði Hanus Eliasen frá baklinjuni og út frá til Høgna Zachariassen, sum tveitti seg fram og tóktist skula skjóta upp í nettakið, men júst í skotroyndini varð fuglfirðingurin takladur, og so spurdist einki burturúr.

Súni Olsen javnaði, tá ið hann sneiddi framvið tveimum og úr støðu einar tríggjar metrar inni í brotsteiginum og eitt sindur til høgru smekkaði í handara síðunetið.

Tað var leingi púra opið, men sum tíðin leið vóru ábendingar um, at tað var størri tyngd í hjá GÍ. Málmøguleikarnir vóru fáir og smáir, og tað var eitt sindur tilvildarligt, tá ið GÍ fekk sigursmálið. ÍF verjan blokeraði skotroynd frá Popczynski uttanvert brotsteigin. Bólturin støkk inn um verjuna og eitt sindur til vinstru. Súni Olsen var fyrstur á honum, og meðan teir reyðu hugdu út á linjuverjan, smekkaði vandamikli maðurin bóltin í kassan. Tá vóru fýra minuttir eftir, og harvarið var greitt, at fuglfirðingar enn eina ferð høvdu tapt ímóti gøtumonnum.

### Einki at reypa av

Samanhangandi fótbóltsspælið var tað einki serligt av í grannauppgerðini. Oftast gekk tað illa at finna viðspælarar, og sjálvt stuttar sendingar og deyðbóltar úr ikki kroystum støðum vóru óneyvt avgreidd.

Miðvallarspælið var ikki serliga væl skipað, og á báðum liðunum var talan um partvíst nýggjar konstellatiónir. Hjá ÍF var Jan Guttesen saman við Høgna Zachariassen. Hanus Eliasen var á toppinum, meðan Bartal Eliasen, sum nú er vorðin liðformaður, var fluttur aftur í miðverjuna.

Hjá GÍ vóru Símun Louis Jacobsen og Poul Henning Jacobsen á sentrala miðvøllinum. Súni Olsen, sum oftast fyrr í ár hevur verið meiri verjukendur miðvallari, var hesa ferð rættuliga frammarlaga. Ov frammarlaga tóktist tað. Men tað var Súni, sum skoraði bæði GÍ málini, og tað hevði í síðsta enda alt at siga.

**ÍF-GÍ 1–2 (1–0)**

**1–0:** Magni á Lakjuni 41.
**1–1:** Súni Olsen 59.
**1–2:** Súni Olsen 84.
**Dómari:** Eiler Rasmussen
**ÍF:** Karstin Joensen – Áki Petersen, Viggo Johannesen, Bartal Eliasen, Rúni Elttør – Fritleif í Lambanum (Teitur Joensen, 77.), Jan Guttesen (Høgni Madsen, 86.), Høgni Zachariassen, Eyðolvur R. Petersen (Sverri Ellingsgaard, 86.) – Hanus Eliasen, Magni á Lakjuni
**Gult kort:** Jan Guttesen
**Reytt kort:** Rúni Elttør

**GÍ:** Hallur Hansen – Poul Ennigarð, Kaj Ennigarð, Atli Gregersen, Hanus Jacobsen – Áslakur R. Petersen (Jónreid Dalheim, 60.), Símun Louis Jacobsen (Poul Andreas Jacobsen, 70.), Poul Henning Jacobsen, Hans Pauli Petersen – Súni Olsen, Krzystof Popczynski
**Gult kort:** Áslakur R. Petersen, Súni Olsen, Atli Gregersen

## Sekstan ár síðani seinast

**Gøtumenn hava havt gott tak á í Fuglafirði nógvu tey seinastu árini**

Hvussu langt er tað síðani, at ÍF seinast vann á GÍ. Fleiri mundu hugsa um hetta í hálvleikssteðginum sunnudagin, tá ið ÍF var á odda 1–0 ímóti GÍ.

Svarið er, at tað eru gott og væl sekstan ár síðani, at fuglfirðingar vunnu heimadyst ímóti GÍ. Tað gjørdu teir í 1988, tá ið úrslitið grundlógardag var 1–0.

Síðani tá hevur tað ikki eydnast ÍF at fingið fult á heimavølli ímóti GÍ. Einasta stigið, sum ÍF síðani tá hevur fingið ímóti GÍ í Fuglafirði, var í 1996, tá ið úrslitið var 1–1. Í 1989 vann GÍ 2–0. Í 1993 og í 1994 vunnu gøtumenn 2–0, í 1997 og í 1998 vunnu teir 4–0, og í 1999 vunnu teir 5–1.

Gøtumenn hava øll árini verið í bestu deildini, har teir vunnu meistaraskapin 1993, 1994, 1995 og í 1996. ÍF hevur ikki verið í bestu deildini øll árini. Í 1990, 1991 og í 1992, og aftur í 1995, 2000, 2001, 2002 og í 2003 var ÍF ikki umboðað í bestu deildini.

Nú stríðast fuglfirðingar fyri at varðveita plássið í bestu deildini. Eftir tíggju umfør hava teir fingið fýra stig. Teir hava vunnið á heimavølli ímóti NSÍ, sum teir sunnudagin aftur skulu spæla ímóti, og teir hava fingið javnt ímóti B68, sum bara hevur fingið hetta eina stigið og er einasta liðið, ið hevur færri stig enn ÍF.
*jh*

## Rúni reytt kort

Allar 90 minuttirnar vóru tað á vøllinum í Fuglafirði ellivu ímóti ellivu. Eftir dystarenda hevði dómarin reyða kortið á lofti.

Talan var ikki um illstøður og harðligt spæl, og dómarin tóktist hava gott tak á tí.

Vinstri vongverjin hjá ÍF, Rúni Elttør, tóktist hava aðra fatan av tí, sum hevði gingið fyri seg. Mátin, sum hann takkaði dómaranum fyri dystin, var av sovornum slagi, at dómarin gav honum reyða kortið. Harvið er greitt, at ÍF skal hava annan mann á vongverjanum í vinstru, tá ið ÍF í vikuskiftinum skal út til Runavíkar at spæla.
*jh*

## Støðan, 1. deild menn

| | | dystir | v | - | j | - | t | vunnin mál | tapt mál | mál-munur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | HB | 9 | 6 | - | 2 | - | 1 | 22 | 9 | 13 | 20 |
| 2 | Skála | 9 | 5 | - | 2 | - | 2 | 20 | 10 | 10 | 17 |
| 3 | B36 | 9 | 4 | - | 3 | - | 2 | 19 | 12 | 7 | 15 |
| 4 | NSÍ | 9 | 4 | - | 3 | - | 2 | 14 | 11 | 3 | 15 |
| 5 | EB/Streymur | 9 | 4 | - | 2 | - | 3 | 17 | 13 | 4 | 14 |
| 6 | GÍ | 10 | 4 | - | 2 | - | 4 | 15 | 20 | -5 | 14 |
| 7 | VB | 9 | 3 | - | 4 | - | 2 | 13 | 10 | 3 | 13 |
| 8 | KÍ | 9 | 2 | - | 6 | - | 1 | 15 | 11 | 4 | 12 |
| 9 | ÍF | 10 | 1 | - | 1 | - | 8 | 14 | 34 | -20 | 4 |
| 10 | B68 | 9 | 0 | - | 1 | - | 8 | 6 | 25 | -19 | 1 |



# Tveir fremmanda menn í Fuglafirði

**Í hesi vikuni verður avgjørt, um tveir spælarar, sum í fjør spældu í næstbestu donsku deildini, skulu spæla við ÍF tað, sum er eftir av hesum árinum**

ÍF SPÆLARAR
*Jóannes Hansen*

Fuglfirðingar liggja tungt í sjónum. Men tað tykist ikki sum um, at ÍF soleiðis uttan víðari ætlar at geva skarvin yvir.

Petur Mohr segðist vera fyribils venjari, tá ið felagið eftir stórtapið á heimavølli ímóti KÍ í 9. umfarinum segði Sigfríð Clementsen úr starvinum. Petur var saman við ÍF á væl eydnaðu venjingarleguni í Aalborg, og hann var á beinkinum sunnudagin. Saman við honum var Torstein Joensen.

Sum tað skilst skal Petur vera venjari og Torstein hjálparvenjari hjá ÍF tað, sum er eftir av hesum árinum. Fremsta uppgávan hjá venjaranum verður at halda ÍF frammanfyri B68, ið er niðast á støðutalvuni. Petur Mohr var venjari á Toftum, inntil hann stutt undan summarsteðginum segði seg úr tí starvinum.

Í summarsteðginum er Høgni Madsen, sum er uppvaksin í ÍF, men sum seinastu árini hevur spælt við GÍ, komin aftur til Fuglafirðar. Hann var á beinkinum, men tá ið tað restau fýra minuttir, kom hann á vøllin ímóti teimum, sum undan summarsteðginum vóru liðfelagar hjá honum.

### Fremmandu menninir

Nú hevur ÍF fingið vitjan úr Danmark. Tveir spælarar eru komnir at royndarvenja. Um tað í hesi vikuni vísir seg, at teir eru upplagdir styrkir til ÍF liðið, so er ætlanin, at teir skulu hjálpa til tað, sum er eftir av hesum árinum.

Talan er um tveir spælarar, sum síðsta kappingarár vóru í FC Nordjylland í næstbestu donsku deildini. Hetta felagið kom í fíggjarligt óføri av sovornum slagi, at tað ikki bar til at komast undan tí. Felagið er tískil uppleyst, og spælararnir royna at finna sær livibreyð aðra staðni.



*Teir báðir, Sylla Amed Davy h.m. og Gunnar Guillermo Nielsen, sum í løtuni eru til royndarvenjingar í Fuglafirði*

Annar maðurin eitur Sylla Amed Davy. Hann er 21 ára gamalur og hálvur russari og hin helvtin er ættað av Fílabeinsstrondini. Hann er álopsspælari, sum í trý ár royndi seg í Lille í Fraklandi. Í FC Nordjylland hevur hann verið í umleið eitt ár. Í summar hevur hann royndarvant í onkrum superligu feløgum í Danmark, og nú er hann altso komin til Fuglafirðar.

Hin maðurin eitur Gunnar Guilermo Nielsen. Hann er 20 ára gamalur og ættaður úr Argentina. Hann verður sagdur at vera framrættaður miðvallari. Danska ættnavnið sigst stava frá, at annar abbin er danskari.

Sagt verður úr Fuglafirði, at spælararnir skulu royna seg í venjingardysti, sum teir fuglfirðingarnir, ið ikki hava spælt so nógv ta síðstu tíðina, fara at spæla í kvøld og í venjingunum, sum eru á skránni tað, sum er eftir av vikuni.

Um tað fer at vísa seg, at fremmandu menninir eru nóg góðir, er ætlanin, at teir skulu vera við, tá ið ÍF mánakvøldið fer at spæla í Runavík.

# Pólverji skal hjálpa GÍ

**Í summarsteðginum eru tríggir spælarar, sum í fleiri ár hava verið í Gøtu, farnir aðra staðni, og nú hava teir fingið ein útlendskan álopsspælara at hjálpa sær**

GÍ LIÐIÐ
*Jóannes Hansen*

Gøtumenn síggja soleiðis upp á tað, at teir við sigirinum í Fuglafirði tóku seg eitt sindur burtur frá botninum. Teir hugsa ikki um so nógv annað í løtuni. Ásannað verður, at gjøgnumtrekkurin í ov langa tíð hevur verið ov stórur, og at hetta sjálvsagt gongur út yvir avrikini og harvið úrtøkuna.

Í summarsteðginum eru tríggir spælarar, sum hava verið á og kring besta liðið seinastu árini, farnir aðra staðni. Ivaleyst er saknurin størstur í Leivi Hansen. Hann hevur seinastu árini verið ógvuliga stinnur og drúgvur í verjuni. Nú er Leivur farin av landinum í lestrarørindum, og tískil fer at síggjast lítið til hansara í gulu blusuni í næstu framtíð.

Magnus Skoralíð, sum er ættaður úr og býr í Leirvík, hevur seinastu árini roynt fótbóltsevnini í Gøtu. Tað hevur gingið eitt sindur striltið hjá honum at vunnið sær fast pláss á besta liðnum. Higartil í ár hava evnini komið meiri til sín rætt, enn tey frammanundan hava gjørt, og Magnus hevur fingið meiri spælitíð, enn hann áður hevur fingið. Í summarsteðginum hevur Magnus gjørt av at flyta aftur til barnsdómsfelagið, sum liggur illa fyri í næstbestu deildini.

Triði spælarin, sum er flogin úr Gøtu í summarsteðginum, er Høgni Madsen. Miðvallarin, sum er uppvaksin í ÍF, er farin aftur í barndómsfelagið. Undan summarsteðginum fór Vitus Kofoed úr Gøtu. Tá var tað felagið, sum ikki metti, at grundarlag var fyri framhaldandi samstarvi.

### Nýggi maðurin

Fyri teir, sum eru farnir, er ein nýggjur spælari komin til Gøtu. Talan er um ein pólverja, sum teir vóna skal hjálpa til frammi á vøllinum. Hann eitur Adam Paluszek, og hann er 24 ára gamalur. Síðstu fimm mánaðirnar hevur hann roynt seg í 3. deild í Póllandi. Frammanundan hevur hann spælt við Wazlaw Krakow. Vit skilja á lagnum, at tað er ein av fótbóltskenningunum hjá Krzystof Popczynski í heimlandinum, sum hevur víst Popczynski og GÍ á júst henda mannin.

Nýggi maðurin var í Fuglafirði sunnudagin. Men hann var sivilklæddur, tí loyvini vóru ikki komin upp á pláss. Sagt verður úr Gøtu, at nýggi maðurin tykist hava góðan skotførleika. Hvussu stór nytta verður í honum vilja teir í Gøtu ikki siga nakað um.

– Vit hava ikki altíð havt so góðar royndir av útlendskum spælarum. Hesin maðurin skal í landskappingini fáa høvi at vísa, hvør dugur er í honum, verður sagt úr Gøtu.

GÍ skal í 11. umfarinum spæla á heimavølli ímóti B68.

Sunnudagin skoraði Súni Olsen bæði málini ímóti ÍF. Hann tykist rættuliga hava funnið stevið. Í síðsta umfarinum undan summarsteðginum, tá ið GÍ vann 4–2 í Vági, skoraði Súni tvey mál. Tá ið GÍ í síðstu viku vann venjingardyst á Skála 5–2, skoraði Súni ikki færri enn trý mál.

